# 11 oksar í tyrlu

NEYTAHALD

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Bóndin í Koltri Bjørn Patursson hevur gjørt beiti til ungneyt av slagnum Scottish Highland Cattle í 478 metra hædd. Leygardagin flutti tyrlan hjá Atlantic Airways 11 ungneyt upp í hæddirnar, og hetta eitt sindur øðrvísi arbeiði eydnaðist sera væl. Bjørn Patursson sigur, at tey høvdu fyrireika seg væl, millum annað gjørdu tey eina roynd í fjør. Hann er sannførdur um, at neyvu fyrireikingar eru orsøk til, at alt eydnaðist so væl. Hann sigur, at hetta verður gjørt aftur.

Scottish Highland Cattle eru fjallaneyt, av tí gamla skotska slagnum, hetta eru sera harðfør neyt, sum ikki kreja nógva røkt. Neytaslagið er ein rein rasa, sum er beinleiðis ættað frá evropeiska uroksanum. Neytini hava varðveitt teir náttúrligu eginleikarnar. Neytini vaksa ikki líka skjótt, sum onkur onnur neytasløg, men kjøti er sera gott. Saman við seyðahaldi eru neytini eitt bein at standa á fyri garðin í Koltri. Bóndin slakter umleið 10 neyt um árið.

Sambært Bjørn Patursson, siga skotar, at Scottish Highland Cattle eigur lívið í teimum. Neytaslagið verður nú flutt úr aftur Skotlandi og inn á meginlandið, har uroksaslagið er útdeytt.

Bjørn Patursson hevur gjørt høga beitið, fyri at geva neytunum rætta smakkin av fjallalendi. Tey skulu tí ganga har uppi í summar.

Oksakjøtið er at rokna sum forkunnugt og ein verulig delikatessa. Bóndahjúnini hava havt neyt av hesum slagi síðan 1999. Tey fyrstu árini er alt kjøtið selt til Glasstovuna á Hotel Føroyum. Men nú er eisini møguleiki at keypa sær kjøt, við at venda sær til bóndan ella við at fara inn á heimasíðuna: www.koltur.com



*11 ungneyt vórðu flutt við tyrlu upp í 478 metra hædd*

*Mynd : Bjørn Patursson*

## Martin Joensen á G!Festivalinum

Martin Joensen varð fyri nøkrum vikum síðan vátt-aður, sum eitt av nøvnunum á MjúS festivalinum á Sandi, og nú váttar G! eisini, at Føroya kanska besti sangskrivari spælir har. Martin Joensen fer í næstum at spæla nýggja fløgu inn, og umframt nýggju løgini verða eisini klassikarar frá Martini at hoyra á Gøtusandi.

## Russiski tjóðardagurin hátíðarhildin á konsulátinum

Russar í Føroyum og familjur teirra vóru í dag savnaði á skrivstovuni hjá russiska Konsulátinum fyri at hátíðarhalda tjóðardagin hjá russum. Tað var Konsulátið og Faroe Agency, sum høvdu bjóða til móttøku. Russiski konsulin í Føroyum Árni Dam bjóðaði vælkomnum, og hugleiddi um sítt samstarv við russar seinastu 30 árini.

**nud**




# Johanna og Jón eru Barnaprix finalistar



*Vinnandi sangararnir og teirra dansigentur.*

SANGKAPPING

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Johanna Niklasen og Jón á Steig mundu ikki steðga at hoppa av gleði, tá dómararnir høvdu tikið sína avgerð og valt tey bæði sum finalistar í Barnaprixnum 2005.

Jón sum gjørdist nummar tvey, kláraði slettis ikki at standa stillur: "Mega gott, vit hava bara vant í 2 dagar, alt var fullkomiliga kaos", segði Jón, sum hevði tær tríggjar Lív, Mariu og Olgu Mariu við sum dansarar. "Lív hótti við at rýma, tí alt var kaos".

Dansararnir hava gingið til fimleik og hip hop, og tað sást á teimum, tær dugdu ordiliga væl at dansa. Jón elskaði at standa á pallinum, hann hevur annars ikki verið á palli í fleiri ár, seinast var, tá hann framførdi í forskúlanum, tá hann búði niðri.

Johanna vann undanumfarið og ordiliga glað, men samstundis eisini móð, hon hevði júst verið á pallinum aftur og sungið vinnara sangin, tá vit hittu hana. Hon segði, "Hetta er ræðuliga gott, vit hava vant ordiliga leingi. Fyrst lærdi eg meg sangin, og so vandu vit dansin. Men so segði systir mín, at dansurin og sangurin ikki riggaðu saman, so máttu vit finna uppá okkurt nýtt."

Eini 150 fólk vóru komin saman í Mentanarhúsinum at lurta eftir teimum 10 sangarunum, sum vóru úr Havn, Klaksvík, Kollafirði, Runavík og Hvalba.